# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*- Steypafinalan leygardagin skal bjarga okkum kappingarárinum.*
*Klæmint Matras, liðformaður hjá B36*

# Spæla um gull og yvirliving á Toftum

**HB fer við sterkastu manning til Toftir at spæla ímóti kroysta botnliðnum, sum ætlar sær at fáa stig burtur úr dystinum**



*HB skal halda lív í FM-vónini við sigri á B68, sum hinvegin stríðist fyri at yvirliva í Formuladeildini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

B68-HB
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað stendur nógv upp á spæl hjá bæði B68 og HB til dystin á Toftum sunnudagin.

HB er nú rættiliga komið við aftur í stríðið um FM-heitið, eftir at EB/Streymur hevur snávað tvær ferðir, og B68 stríðist fyri lívinum í Formuladeildini.

Seinasta umfarið í Formuladeildini passaði væl til bæði HB og B68. HB vann sín dyst, meðan EB/Streymur tapti, og B68 vann týdningarmikla botndystin ímóti ÍF.

Nú bresta hesi bæði liðini saman í einum dysti, har bæði vilja vinna, men har B68 kanska best kann liva við javnleiki, eftir at toftamenn tóku seg tvey stig fram um hini botnliðini í seinasta umfari

### Væl mannað lið

Bæði B68 og HB stilla við sterkastu manning til dystin sunnudagin.

Tað hevur verið eitt sindur tunnligt til venjing hjá HB í vikuni, tí eini 9 spælarar hava verið burtur við A ella U19 landsliðunum. Hóskvøldið vóru allir aftur til venjing, og allir spælararnir eru tøkir til dystin sunnudagin.

Hjá B68 stendur eisini væl til við fólki. Jann Ingi Petersen hevði leikbann seinast, men hann er tøkur aftur. Verjuspælararnir Kári Hansen spælir ikki aftur í ár, meðan Øssur Hansen verður við báðar dystirnar, sum eftir eru at spæla.

Julian Johnsson fekk ein snudd á landsliðnum, men hann hevur vant í vikuni, og á Toftum rokna tey við, at hann spælir ímóti HB.

# EB/Streymur skal venda skútuni

**Oddaliðið hevur ikki vunnið tríggjar teir seinastu dystirnar, nú teir sunnudagin skulu venda gongdini í Fuglafirði, har ÍF fer at gera alt fyri at sleppa upp um niðurflytingarstrikuna**

ÍF-EB/STREYMUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Oddaliðið hevur ikki vunnið ein landskappingardyst í næstan ein mánað. Seinasti sigurin EB/Streymur fekk, var 17. september tá teir vunnu 2-0 á Skála.

Og september hevur verið ein strævin mánaður fyri EB/Streym, men nú hevur landsdystur verið og liðið hevur løtt battaríini aftur, og ætla teir á felagsliðnum at herja á sunnudagin.

### Bárður við aftur

Manningarliga sær tað eisini betri út, enn tað hevur gjørt í langa tíð hjá EB/Streymi. Bárður Olsen er við aftur eftir at hevur sitið uttan fyri við skaða, hann fekk í fyrra hálvfinaludystinum móti B36.

Hetta fegnast tey um í Sundalagnum, og eisini styrkir tað munandi um hópin, at Egil á Bø kemur aftur í verjuna, eftir at hava verið leikbannaður seinasta dyst.

Jørgin Meitilberg hevur ikki vant saman við hópinum í vikuni, men hann miðar eftir at vera tøkur sunnudagin. Tað sama ger Hans Pauli Samuelsen, sum gav avboð til landsdystirnar báðar, tí hann fekk ein snudd undir landsliðsvenjingunum.

Einasti leikarin, sum heilt víst ikki verður tøkur hjá EB/Streymi, er Marni Djurhuus, tí hann hevur karantenu eftir at hava fingið fimm gul kort.

### Bartal leikbannaður

Í Fuglafirði ætlar ÍF sær øll trý stigini. Hetta verður truplt ásanna fuglfirðingar, men samstundis neyðugt, um tilveran í bestu deildini skal leingjast eitt ár aftrat.

Greitt er, at Bartal Eliasen ikki verður við. Hann fekk gula kort nummar átta seinasta dyst, og er sostatt leikbannaður sunnudagin. Hetta er ein dyggur smeitur hjá ÍF.

Harnæst hevur liðið fleiri smáskaðar at dragast við. Serliga eru tað Høgni Zachariassen og Fritleif í Lambanum, sum hava havt trupulleikar, men í Fuglafirði rokna tey við, at hesir báðir kortini verða tøkir til dystin, sum er so sera týdningarmikil fyri bæði ÍF í botninum og EB/Streym í oddinum.

**Formula-deildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 25 | 15 | - | 6 | - | 4 | 61 | 28 | 33 | 51 |
| 2 HB | 25 | 14 | - | 7 | - | 4 | 58 | 36 | 22 | 49 |
| 3 B36 | 25 | 12 | - | 7 | - | 6 | 41 | 29 | 12 | 43 |
| 4 KÍ | 25 | 11 | - | 9 | - | 5 | 52 | 35 | 17 | 42 |
| 5 NSÍ | 25 | 11 | - | 6 | - | 8 | 48 | 37 | 11 | 39 |
| 6 GÍ | 25 | 9 | - | 11 | - | 5 | 34 | 31 | 3 | 38 |
| 7 Skála | 25 | 7 | - | 8 | - | 10 | 30 | 26 | 4 | 29 |
| 8 B68 | 25 | 4 | - | 6 | - | 15 | 34 | 55 | -21 | 18 |
| 9 ÍF | 25 | 4 | - | 4 | - | 17 | 28 | 58 | -30 | 16 |
| 10 VB/S | 25 | 4 | - | 4 | - | 17 | 21 | 72 | -51 | 16 |

**1. deild**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B71 | 20 | 14 | - | 4 | - | 2 | 70 | 26 | 44 | 46 |
| 2 AB | 19 | 13 | - | 2 | - | 4 | 44 | 26 | 18 | 41 |
| 3 LÍF | 19 | 11 | - | 3 | - | 5 | 39 | 23 | 16 | 36 |
| 4 TB | 21 | 9 | - | 3 | - | 9 | 33 | 32 | 1 | 30 |
| 5 HB | 20 | 6 | - | 3 | - | 11 | 38 | 48 | -10 | 21 |
| 6 KÍ | 19 | 6 | - | 2 | - | 11 | 35 | 65 | -30 | 20 |
| 7 FSV04 | 19 | 6 | - | 1 | - | 12 | 22 | 32 | -10 | 19 |
| 8 SÍ | 19 | 3 | - | 2 | - | 14 | 35 | 64 | -29 | 11 |

# VB/S hevur vónina

**Hóast B68 hevur tikið seg fram um VB/Sumba og ÍF, hava teir í Vági framvegis vón um at yvirliva í Formuladeildini**

VB/S-NSÍ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Nú hevur VB/Sumba tvey skot eftir í byrsuni. Liðið, sum í løtuni liggur til niðurflyting úr Formuladeildini, kann bjarga sær í deildini, men so er neyðugt við tveimum plettskotum í seinastu umførunum.

Sunnudagin kemur NSÍ á vitjan í Vági, og runavíkingar hava ikki staðið seg serliga væl seinastu umførini. NSÍ hevur bert fingið fýra stig seks seinastu dystunum, og tað tykist, sum at liðið hevur lítið at spæla fyri restina av kappingin. Liðið hevur framvegis ein lítlan møguleika at røkka fram til heiðursmerkini, men so skal liðið vinna í teimum báðum seinastu dystunum.

NSÍ hevur allar sínar spælarar tøkar til dystin í Vági sunnudagin.

Christian Høgni Jacobsen hevur verið burtur í landsliðsørindum, og tað hava eisini Bogi Løkin og Einar Hansen, sum spæla við U19 landsliðnum.

### Vónin er til staðar

VB/Sumba hevur eisini allar sínar spælarar tøkar til dystin sunnudagin. Einki leikbann er hesaferð, og teir smáu skaðarnir, sum eru í leguni, fara ikki at forða nøkrum í ár spæla sunnudagin.

- Um vit hava sama hugburð til dystin sunnudagin, sum vit høvdu ímóti HB seinast, so kann alt henda. Vit skulu veruliga stríðast fyri okkara kjansi, og allir spælararnir mugu arbeiða hart fyri einum góðum úrsliti, sigur Bjarni Johansen, sum er annar venjarin hjá VB/Sumba.

- Støðan hjá okkum er ikki tann besta, og tað verður trupult at sleppa undan niðurflyting, men vit hava framvegis vónina, og vit ætla at stríðast til tað seinasta, sigur hann.